*Olju- og undirgrundarfrágreiðingin:*

# Komið undir land

*Tað líðir nú so væl við arbeiðinum uppá frágreiðingina um undirgrund og møguliga oljuvinnu, at landsstýrið fær hana í hesum mánaðinum*



*Teir 8 limirnir í Oljuráðleggingarnevndini ... fund alla síðstu viku, har seinasta hond varð løgd á arbeiðið. Aftast f.v. Susanna Danielsen, deildarleiðari í landsstýrinum, Tina Hansen, skrivari, Árni Ólafson, búskaparfrøðingur, Martin Heinesen, jarðfrøðingur, Halgir W. Poulsen, løgfrøðingur, og fremst f.v. Jørgen Norgaard frá danska orkamálaráðnum, Arne Nørrevang, ráðgevi í umhvørvismálum, Steffan Hultberg, jarðfrøðingur hjá DGU Føroya deild og Morten Sparre Andersen eisini jarðfrøðingur hjá DGU. Mynd kalmar*

Nøgv umrødda og eftirspurda frágreiðingin hjá oljuráðleggingarnevndini um, hvussu farast skal víðari í sambandi við yvirtøkuna av undirgrundini og kanningum av eini møguligari komandi oljuvinnu verður nú veruliga skrivað. Komið er undir land við hesum drúgva og tvøðandi kanningararbeiði sigur ein av limunum í nevndini við Sosialin.

Landsstýrið fær endaligu frágreiðingina í hesum mánaðinum.

### Fundaðust í Havn alla síðstu viku

Oljuráðleggingarnevndin hevði fund í Havn tað mesta av farnu viku, har seinasta hond varð løgd á arbeiðið. Sosialurin frættir, at nevndin hevur arbeitt væl saman og fingið væl burtur úr.

Tað var landsstýrið, sum setti nevndina nakað herfyri og hevur nevndin havt fundir bæði í Føroyum og í Danmark hetta seinasta hálva árið.

Nevndin hevur havt til uppgávu at koma við eini tilráðing til landsstýrið um allan undirgrundarspurningin, nú undirgrundin er vorðin føroysk. Nógvir spurningar tengja seg at einum slíkum tilmæli og tí hevur nevndin verið samansett av fólkum, sum umboða ymsar greinar í samfelagnum tað veri seg løgfrøði, búskap, umhvørvi, jarðfrøði o.a.

### Oljuvinna!

Umframt spurningar, sum hava beinleiðis við yvirtøkuna av undirgrundini at gera, so hevur tað eisini verið eitt ynski hjá landsstýrinum at fáa nevndina at koma við síni hugsan um, hvussu vit eiga at bera okkum at í sambandi við eina komandi oljuvinnu her á landi.

Stórur áhugi er fyri at gera kanningar á føroyskum øki fyri at vita, um olja og gass er í undirgrundini.

Landsstýrið hevur fingið nógvar umsóknir frá útlendskum feløgunum og umboð fyri nøgv av hesum feløgunum hava eisini vitjað í Føroyum fyri at vísa á sín stóra áhuga. Her er fyrst og fremst talan um seismiskar kanningar.

Landsstýrið hevur so havt fá avgjørdu støðu, at nágreiniligar kanningar skulu ikki byrja fyrr enn Oljuráðleggingarnevndin er komin við sínum tilmæli.

### Nevndin og framtíðin

Spurningurin um hvussu verður við hesi nevnd eftir at landsstýrið hevur fingið tilmælið er óvissur. Helst fær hon til uppgávu at halda fram við sínum arbeiði, tí tilmælið til landsstýrið er bara karmurin um, hvussu farast skal víðari. Og í hesum sambandi verður tørvur á fólki til at gera tað víðari arbeiðið.

jan







## Tvangsauktion

På Dommerkontoret, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, afholdes

**torsdag den 1. juli 1993 kl. 09.00**

tvangsauktion, (AS 198/93), over matr. nr. 239 b, Sumba, beliggende Lopra

Auktionen er begæret af advokat Tórmóður Djurhuus v/ advokatfuldmægtig Jógvan Ellefsen, Advokatfelagið, Bryggjubakki 22, 100 Tórshavn, tlf. 1 1260, (j.nr. 29330) på vegne en pant- og udlægshaver.

Ejendommen er et beboelseshus, opført på en 401 kvm. stor grund. Det bebyggede areal udgør 119 kvm. i 2 etager.

Ejendommen kan beses efter aftale med ovennævnte advokat.

Auktionsdokumenterne ligger til gennemsyn på dommerkontoret.

**Færøernes fogedret**
*den 03.06.93*
**Mette Søgaard-Nielsen**
**dfm.**